Dátueftirlitið

# Dátueftirlitið søkir eftir fulltrúa

## Avbjóðandi og spennandi starv í Dátueftirlitinum til setanar 1. oktober 2024 ella skjótast til ber

**Starvið**
Fast starv sum løgfrøðingur er leyst at søkja. Ert tú løgfrøðingur og hevur hug at arbeiða við dátuvernd, so er starvið sum fulltrúi hjá Dátueftirlitinum júst nakað fyri teg.

**Uppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjøltáttaðar og fevna m.a. um ítøkiliga og almenna ráðgeving og kunning um dátuverndarøkið, at svara fyrispurningum, ummæli av lóggávu, eftirlitsmál, fyrireiking av málum at leggja fyri Dáturáðið og luttøku í norðurlendskum o.ø. samstarvi.

Tú fert at arbeiða sjálvstøðugt, tó at stórur dentur verður lagdur á samstarv og sparring við hini starvsfólkini hjá Dátueftirlitinum. Eisini fert tú at taka lut í okkara kunnandi virksemi, t.e. við undirvísing o.ø.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava løgfrøðiligt embætisprógv (cand. jur. ella Emb.L) ella annað viðkomandi kandidatprógv, har løgfrøði er ein munandi partur av útbúgvingini.

Harumframt skalt tú:

- hava góðar fakligar førleikar og hava áhuga fyri dátuverndarøkinum
- dáma væl at arbeiða sjálvstøðugt
- sýna ábyrgd og skilvísi
- vera ágrýtin, nýhugsandi og dáma væl avbjóðingar
- duga væl at samskifta og samstarva við onnur
- duga at miðla eitt torgreitt lógarøki á ein einfaldan hátt, so at fyritøkur, stovnar, borgarar, politikarar, fjølmiðlar og onnur skilja.
- duga væl føroyskt í skrift og talu

Tað er ein fyrimunur um tú áður hevur arbeitt við dátuverndarrætti, hevur havt dátuverdarrætt sum part av útbúgvingini, ella um tú hevur tikið altjóða viðurkendar góðkenningar innan dátuvernd frá eitt nú IAPP ella líknandi felagsskapum.

Lesandi, sum eru um at gera útbúgvingina lidna, eru eisini vælkomin at søkja.

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum støði, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Dátueftirlitið húsast í góðum og rúmligum hølum á Heiðavegi 25 í Saltangará. Tónin er léttur, og trivnaðurin hevur nógv at siga. Sum fulltrúi á Dátueftirlitinum fært tú ein gerandisdag saman við hugagóðum og hjálpsomum starvsfeløgum.

**Løn og setanartreytir**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála

---

***Dátueftirlitið** er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, ið umsitur løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum. Dátueftirlitið er skipað við skrivstovu og dáturáði. Dagliga virksemi hjá Dátueftirlitinum verður røkt av skrivstovuni undir leiðslu av einum stjóra. 6 fólk starvast í Dátueftirlitinum.*

Dátueftirlitið

millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi
yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV og møguligum viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 30. juni 2024, og sendast til:

Dátueftirlitið
Heiðavegur 25
FO-600 Saltangará

ella á tori@dat.fo

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Tóra Højgaard, stjóra, tlf. 299100.